LM-067/2022

fylgiskjal 16.

Útskrift
úr
GERÐABÓKINI hjá NÁTTÚRUFRIÐINGARNEVNDINI fyri EYSTUROYAR SÝSLU

Ár 2021, týsdagin hin 24. august kl. 1000 var fundur hildin í Náttúrufriðingarnevndini fyri Eysturoyar sýslu á Mýravegi 2, á politistøðini í (620) Runavík.

Formaðurin Jens H. Jensen, sýslumaður hevði innkallað til - og setti fundin. Nevndarlimirnir Marnar Gærdum av Strondum og Annvør Jacobsen av Eiði vóru møttir.

Til viðgerðar:	Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd til hoyringar – talan er um lógaruppskot hjá landsstýrinum, ið leggjast skal fyri Føroya Løgting. ***Okkara Journal nr. 5600-88130-64-21.***
Framlagt er:	1: Teldupostur frá umhvørvis- og vinnumálaráðnum dagfestur 23. Juli 2021 við svarfreist til 6. September 2021. - 1. síða. 2: Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd. pdf - 92 síður. 3: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing.pdf – 8 síður. 4 Fylgiskjal 1: javntekstur um broyttar orðingar. - 6 síður.

Skjølini, ið framløgd eru vera ikki send inn saman við frágreiðingini, við tað at tað sær út til, at allir partar hava fingið tey sendandi saman við teldupostinum. Skuldi onkur haft ynski um tað, so hava vit skjølini teldutøk og kunna vit prenta tey út eftir ynski.

Náttúrufriðingarnevndin fyri Eysturoyar Sýslu møtti fyri at viðgera lógaruppskotið og tey skjøl, ið send vóru okkum saman við teldupostinum.

Tað er at fegnast um, at løgtingslóg um náttúrufriðing sum er frá 1970 verður endurskoða og dagførd.

Í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrurfriðing - vekjir undiryvirskriftin undran. Tí har stendur: (Avtøka av friðingarnevndum o.a.) meðan í viðmerkingunum til kapittul 1: stendur:
Tað verða framvegis tær staðbundnu friðingarnevndinar og yvirfriðingarnevndin, sum vera myndugleikar eftir náttúrurfriðingarlógini.

Lógaruppskotið er tó meira víðfevnt og snýr seg eisini um at røkja lív-, landslags- og jarðfrøði margfeldi (bio-diversitet).

Útyvir at viðgera mál um bygging, vegir, antennur og líknandi verkætlanir halda vit, at førleikin hjá nevndini fer at skorta ella at krevja serkøna hjálp.

Viðvíkjandi friðingarheimildunum er tað ein lætti, at Náttúrurfriðingarnevndin sleppur undan at seta slíkar í verk eftir gomlu ásetingini í § 6 – tí at førleikakrøvini til slíkar avgerðir eru helst nógv meira víðfevndur og krevur størri fakligar førleikar enn tær staðbundnu náttúrufriðingarnevndinar ráða yvir.

Viðvíkjandi fylgiskjali 1: Javntekstur – hevur náttúrufriðingarnevndina ongar viðmerkingar, men tekur undir við dagføringunum.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið kapittul 1.1: verður staðfest, at galdandi løgtingslóg um náttúrufriðing verður nakað skerd, men framhaldandi galdandi.

Tískil væntar náttúrufriðingarnevndin ikki, at mannagongdirnar, sum higartil hava verið brúktar fara at vera broyttar, men halda fram, tó við atliti til víðkaða øki tá ið tað kemur til lívfrøði margfeldi.

Tó má atlit takast til lívfrøðiligt margfeldni – men slíkar spurningar má roknast við, at stovunur undir landstýrismanninum kemur at taka sær av. Javnber punkt 1.2.

2.15 verður atgongd hjá almennum myndugleikum viðgjørdur. Tað er ein víðkan av ásetingini í § 12 stk. 3 í verandi lóg.

Fundur lokin kl. 1100.

Jens H. Jensen,
Sign.

Annvør Jacobsen.
Sign.

Marnar Gærdum.
Sign.

Váttað verður, at útskriftin er røtt og dagfestingin er bein.

NÁTTÚRUFRIÐINGARNEVNDIN fyri EYSTUROYAR SÝSLU, tann 24/08-2021.

Jens H. Jensen, formaður.

Sent til:

- Yvirfriðingarnevndina, C. Pløjensgøra 1, Postoks 28, 110 Tórshavn.
- Umhvørvis- og Vinnumálaráðið, Gongin 7, Boks 377, 110 Tórshavn.